# Jógvan Ólason, lærara úr Fuglafirði, til minnis



Við Bøveg er gott at búgva. Her er útsýnið so frágerða gott. Allur fjørðurin liggur við føtur tínar, og litirnir úr hesum vatni livir í djúpum, bláum havliti, grønum bøliti, jarðgrønum fjallaliti, í stálgráum hvitmyljum og í skarum sólarljósi, sum er í dandandi lygnum. Ættarlið eftir ættarlið hava á æviskeiði síni latið hetta ljós flotið inn i eygnakrókarnar dag um dag, viku eftir viku og ár um ár. Hetta ljós er ogn okkara. Jógvan og Oluffa, konan, hava búð við Bøveg eini 20 ár. Barnvaksin eru tey bæði i Fuglafirði - hon Heimi á Miðju og Jógvan við Bakkageil í sama umhvørvi. Hjá honum var gluggin út imóti firðinum ein málningur, sum eygað dagliga festi seg við. Ljósið kemur úr erva - av fjallagreinunum, og dettur niður a vágna, liggur har og fær okkara tankar at leita til farnar dagar og løtur. So mangur situr soleiðis frammi i vindeygakarminum, hyggur og hugsar. Jógvan var einki undantak. Her sat hann í sólarrenningini, tá ið morgunsólin nam við Nón og í skýmingarløtum, tá ið dagslýsið goymdi seg i Blábjørgum, Lorviksfjalli og í tí djúpa vatninum.

Per Lagerkvist sigur i yrking síni

Det är vackrest när det skymmer í týðing hjá Alexandur Kristjansen.

Kámt um heiðar dimmið lýsir.
Øll tann gleðin, himin hýsir,
ljómar milt um fjøll og dal og líð
og seg sveipar
eymt um bygd og bý.

Eymliga mær kína mjúkar hendur.
Harrin sjálvur sáar fjarar strendur.
Alt er nær og fjart sum ellissorg.
Alt er givið
okkum upp á borg.

Alt eg eigi - alt skal takast frá mær.
Um eitt bil skal løtan takast frá mær.
Hagin, heimið, dagsins
dýru orð.
Eg skal fjakka -
eina uttan spor.

1967 tók Jógvan lærara-prógv. Hetta var i juni mánaði. Martin Holm, sáli, hevði hildið talu fyri okkum, og sálmurin Guð, tú sum ljósið lætst skýna so bjart, varð sungin, tá ið vit fingu prógvið. Eftir hetta bjóðaði Bjarni Skaalum Út undir Klett úti á Reyni. I hesum hópi var Jógvan Ólason. Hetta var fagnaðarløta av teimum stóru. Tá ið vit vóru setstir i bestustovu hjá Nigga, segði Bjarni: Nú skulu tit hoyra eina nýggja LP, sum eg havi fingið við Beatlaløgum. - Av hesi fløgu ljómaði Yesterday. Vit stóðu i miðjum vavi í teimum ljóðkátu sekstiárunum. Høvdu dansað eftir løgunum frá Faroe Boys í Sjónleikarhúsinum, og nú ljómaði Yesterday úr stovuni hjá Nigga úti í Tinganesi. Vit lurtaðu, tóku lagið til okkum og hugsaðu, at løtan í gjár á Lærarskúlanum var nú farin. Við lærarpróvnum stóðu vit í miðjum kringi og vóru mansbørn á foldum. …øll tann gleði, himin hýsir, ljómar milt um dal og líð… Hetta var løta, sum vit seint gloymdu, og sum vit ofta róðu afturá… Alt ljóst lá fyri framman, og dagurin í gjár var lunnbótin í útbúgvingini sum lærari og skuldi vera tín barlast í hesum gerningi.

Jogvan var lærari í Oyndarfirði, Leirvík, Gøtu og Fuglafirði. Hann starvaðist við Fuglafjarðar skúla frá 1978 til fyri tveimum árum síðani. Øll hesi ár sessaðust vit á lærarastovuni í skúlatíðini og umrøddu skúlamál, samfelagsviðurskifti, bygdamál, prátaðu um seyð, snøristúrar, havhestatúrar og gamlar dagar frá skúlatíðini í Havnini, tá ið vit búðu i kjallarinum hjá Gertrude og Absalon Eysturoy.

Hóast tað var i gjár .. yesterday..… alt er nær og fjart sum ellissorg… so var árinið frá hesi tíð ein partur av lunnbótini. Onkuntíð mælti Jógvan, at hann kundi hugsað sær at liva bert ein dag aftur av hesum ljóðkátu sekstiárunum í Havnini undir lonini hjá Gertrude og Absalon Eysturoy. Tað er dreymurin at fáa fatur í tí, sum var gott.. men ... Alt er givið okkum upp á borg.. svá er, og hetta faa vit einki gjørt við, men minnisríkar løtur fra hesi tið, høvdu vit ofta a munni, sum seint fara í óminni.

Sangari var Jógvan góður, og hava vit bæði í sorgarstundum, vertskapi og gleðiløtum sungið saman. Løtan, sum var í gjár, var góð, men: Alt eg eigi - alt skal takast frá mær. Um eitt bil skal løtan takast frá mær. Hagin, heimið, dagsins dýru orð.

Hann var ein góður lærari, læt einki falla av, tá ið tað kom til undirvísing. Hann duldi heldur ikki fyri, tá nýtt kom inn í skúlan, at árinið av hesum kundi gera, at kunnleikin, sum næmingarnir skuldu hava, var skerdur, og hugsi, at rætt hevði hann í hesum.

Jógvan var ein góður starvsfelagi. Tá ið um skúlamál galt, var hann greiður í síni støðutakan. Hann hevði hetta í sær, at næmingarnir skuldu duga, og eru nógv dømi um tað. Hetta er ein lítil partur av tí, sum rann mær til hugs hesa løtu, har minnisbrot um Jógvan skuldu festast a blað.

Síðstu árini hevur Jógvan verið heilsuveikur, og sást hann ofta sita framman fyri køksgluggan við Bøveg og hyggja út á fjørðin, har ljós og hav møttust. Henda gluggamynd er stórbar, sum vit eru ein partur av. Luffa var Jógvani ein góður stuðul í hesi trongu tíð, tá ið sporini hjánaðu burtur á leiðina... Eg skal fjakka - eina uttan spor. Tá ið løtan nærkast, er tað ljósið, sum er kring okkum og í sálminum: Guð, tú sum ljósið lætst skýna so bjart, sum ger okkum eym og smá… tað, at vit fara burtur uttan spor, er eisini eitt spor, sum ljósið tekur til sín og goymir í magni og anda.

Friður verði yvir minninum um Jógvan Ólason, lærara úr Fuglafirði.

**Frits Johannesen**







# 3,4 prosent um árið er stór lønarhækking

**Arbeiðsgevararnir tóku undir við semingsuppskotinum, sum gav arbeiðsfólkunum 3,4 prosent í lønarhækking um árið. Arbeiðarafeløgini við Føroya Arbeiðarafelag á odda vrakaðu uppskotið og rendu alt landið í verkfall. Lønarkravið hjá arbeiðarafeløgunum er veruleikafjart og hevði eftir stuttari tíð rent vinnuna um koll. Her eru átta góðar grundir til at vísa hógv í lønarkrøvunum**

**1 Arbeiðarafeløgini hava fingið størri lønarvøkstur enn onnur feløg**

Síðan 1993 eru lønirnar hjá limunum í Starvsmannafelagnum í miðal hækkaðar 18,5 prosent við eftirløn. Sama tíðarskeið eru lønirnar hjá limunum í arbeiðarafeløgunum hækkaðar heili 25 prosent við eftirløn. Arbeiðsfólk eru sostatt ikki eftirbátur, tá ið tað snýr seg um lønarvøkstur síðan kreppuna.

**2 Lønarhækkingin í semingsuppskotinum er hægri enn í øðrum londum**

Lønarvøksturin hjá arbeiðsfólkum í Evropa í miðal verður væntandi 2,8 prosent í ár og 2,9 prosent komandi ár. Í Grønlandi krevja arbeiðarafeløgini 3,4 prosent meira í løn um árið, meðan arbeiðsgevararnir einans vilja lata 1,8 prosent. Føroysku arbeiðsgevararnir hava boðið arbeiðarafeløgunum 3,4 prosent. Hetta er tí stór lønarhækking.

**3 Føroyska reallønin er nógv vaksin seinastu árini**

Síðan seinastu lønarsamráðingar í 2001 er prístalið, sum vísir, hvussu dýrt tað er at liva, hækkað 1,9 prosent. Sama tíðarskeið hækkaðu arbeiðaralønirnar 10,1 prosent. Haraftrat kemur eftirlønin. Tilsamans hevur vøksturin í reallønini hjá føroysku arbeiðarafjøldini tí verið ovurstórur seinastu tvey árini.

**4 Við skattalættum er lønarvøksturin síðan 1999 heili 32,2 prosent**

Seinastu fýra árini hevur lønarvøksturin hjá limunum í arbeiðarafeløgunum verið 20,5 prosent. Skattalættarnir sama tíðarskeið hava verið 2 og 4 prosent, sum svarar til 4 og 8 prosent í lønarvøkstri. Verða skattalættarnir roknaðir uppí, eru lønirnar sostatt hækkaðar tilsamans 32,5 prosent.

**5 Vøksturin í búskapinum er steðgaður**

Vøksturin í føroyska búskapinum er steðgaður, og fleiri vinnugreinir eru í kreppu. Rækjuvinnan knógvar undir fallandi prísum, og álvarslig sjúka ger um seg í alivinnuni. Virðið á feskfiskaveiðuni fellur alsamt, og eisini veiðan sjálv minkar. Tí hava vit ikki ráð til størri lønarvøkstur enn í grannalondunum.

**6 Avlopið í flakavinnuni hvørvur av lønarkrøvum**

Skal flakavinnan gjalda veruleikafjaru lønarhækkingina, sum arbeiðarafeløgini krevja, kostar tað flakavinnuni 25 milliónir krónur í meirútreiðslum fyrsta árið og 50 milliónir krónur aftrat næsta árið. Øll flakavinnan hevði til samanberingar 13 milliónir krónur í avlopi í miðal um árið frá 1996 til 2001.

**7 Arbeiðspláss verða flutt av landinum**

Kappingarførið hjá vinnuni versnar fyri hvørja krónu, sum lønin veksur meira enn í grannalondunum. Tá ið kappingarførið versnar, fer fiskurin óvirkaður av landinum. Í fjør fóru 50.000 tons óvirkað til virkir uttanlands. Veksur talið við 12.000 tonsum næsta ár, svarar tað til, at føroyingar missa eitt arbeiðspláss á støðd við Kósina í Klaksvík.

**8 Føroyingar eru evropameistarar í verkføllum**

Seinastu fýra árini eru 6.000 arbeiðsdagar fyri hvørjar 1.000 íbúgvar mistir orsakað av verkføllum í Føroyum. Í Danmørk, sum liggur á øðrum plássi yvir illa plágað lond av verkføllum, eru bert 462 arbeiðsdagar mistir fyri hvørjar 1.000 íbúgvar sama tíðarskeið. Tíverri eru føroyingar sostatt ónertiligir evropameistarar í verkføllum.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**Lesið meira um sáttmálatrætuna á www.industry.fo**

VINNUHÚSIÐ
House of Industry